# Gerðabók í sambandi við fund viðvíkjandi skipan av Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024

J.nr. 20/00576-10

**Dagfesting:** 03.12.2020 kl. 19:00

Møtt vóru:

**Fyri lista F**
Dávur Juul
David Andreasen
Eivin Breiðaskarð

**Fyri lista B**
Eyðun á Lakjuni
Magni Jøkladal
Edva Jacobsen

**Fyri lista Á**
Sonni á Horni
Ólavur Larsen
Gudny Vang

Skrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| 15/20 | 20/00576-9 | Fundur í sambandi við skipan av Fuglafjarðar býráð tíðarskeiðið 2021-2024 | 1 |

## 15/20
## 20/00576-9 Fundur í sambandi við skipan av Fuglafjarðar býráð tíðarskeiðið 2021-2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Nýggja býráðnum, valskeiðið 2021-2024 | 03.12.2020 | 15/20 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Nýggja býráðnum, valskeiðið 2021-2024 |
|---|---|
| Stutt lýsing | Kommunustjórin móttók tann 12. november í ár bræv frá Eivin Breiðaskarð, núverandi og nývaldur býráðslimur, dagfest 11. november í ár, sum nývaldu býráðslimirnir á listunum F og B høvdu orða- og undirskriva í felag viðvíkjandi uppskoti um skipan av Fuglafjarðar býráð tíðarskeiðið 2021-2024.<br><br>Í nevnda brævi stóð skrivað, at listarnir F og B høvdu avtala at ganga saman í valbólk, og skipað seg við Dávur Juul sum borgarstjóra. Brævið, sum var skrivað í samráði við Dávur Juul, ið var til skips, var undirskriva av 5 nývaldum býráðslimum: Eivin Breiðaskarð, Eyðun á Lakjuni, Edvu Jacobsen, Magna Jøkladal og David Andreasen.<br><br>Dávur Juul kallaði nývalda býráðið saman til skipandi fund 3. desember í ár í soljóðandi teldubrævi til Fuglafjarðar kommunu, dagfest 23. november 2020:<br><br>*«Til Fuglafjarðar kommunu*<br>*Góðan dag*<br>*Sum fyrst valdur býráðslimur á kommunuvalinum 10 nov. 2020 er tað álagt mær, í fylgi valbrævinum dagfest 12. nov. 2020, at innkallað nýggja býráði.*<br>*Eg vil við hesum innkallað býráði tann 3. desember 2020 til skipan av býráði.*<br>*Vinarlig heilsan*<br>*Dávur Juul"*<br><br>Við støði í teldubrævinum frá Dávur Juul til Fuglafjarðar kommunu, vórðu nývaldu býráðslimir við innskrivaðum brøvum, dagfest 26. november 2020, undirskrivaði av Dávur Juul og kommunustjóranum, innkallaðir til skipandi fund tann 3. desember í ár samsvarandi kommunustýrislógini § 12, stk. 2, 2. pkt.<br><br>Dagsskráin í sambandi við skipandi býráðsfundin varð henda:<br><br>1. Val av formansskapi – borgarstjóra, varaborgarstjóra og 2. varaborgarstjóra<br>2. Val av føstum nevndum<br>3. Val av øðrum nevndum og umboðum |
| Bakgrund | Fyrstvaldi á kommunuvalinum 10. november 2020, hevur innkallað til fund til skipan av Fuglafjarðar býráðið valskeiðið 2021-2024 |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin kapittul 1-3, 6 og 7**<br>• Møgulig fylgiskjøl |
| Viðgerð | |

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til, at formansskapur, fastar nevndir og aðrar nevndir og umboð verða vald samsvarandi kapittul 1-3, 6 og 7 í kommunustýrislógini | | |
| Dagf | 02/12-2020 | | |

**Nývalda býráðið á skipandi fundi tann 3. desember 2020**

<u>Til nr. 1 – val av formansskapi – borgarstjóra, varaborgarstjóra og 2. varaborgarstjóra</u>

- **Val av Borgarstjóra**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Dávur Juul á lista F til borgarstjóra valskeiðið 2021-2024.

**Avgerð**
Uppskotið frá valbólkinum um val av borgarstjóra varð samtykt. 6 atkvøður fyri, eingin ímóti og 3 blankar atkvøður. Fyri atkvøddu Dávur Juul, David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu blankt. Sostatt er Dávur Juul valdur til borgarstjóra valskeiðið 2021-2024.

- **Val av Varaborgarstjóra og 2. Varaborgarstjóra**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Eyðun á Lakjuni á lista B til varaborgarstjóra. Uppskot frá lista Á um at velja Sonna á Horni á lista Á sum 2. varaborgarstjóra.

**Avgerð**
Uppskotini frá valbólkinum B og F og lista Á um val av varaborgarstjórum varð einmælt samtykt (9-0). Dávur Juul, David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen, Ólavur Larsen, Gudny Vang og Sonni á Horni atkvøddu fyri uppskotunum. Sostatt eru Eyðun á Lakjuni og Sonni á Horni valdir til ávíkavist varaborgarstjóra og 2. varaborgarstjóra valskeiðið 2021-2024.

<u>Til nr. 2 – val av føstum nevndum</u>

- **Val av Fíggjarnevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Eyðun á Lakjuni á lista B sum fastan lim og Edvu Jacobsen sum tiltakslim fyri Eyðun á Lakjuni. Borgarstjórin er fastur limur og formaður í fíggjarnevndini. Valbólkurin F og B høvdu uppskot um Eivin Breiðaskarð á lista F sum tiltakslim fyri borgarstjóran

Listi Á mælir til at velja Ólavur Larsen sum fastan lim og Gudny Vang sum tiltakslim fyri Ólav Larsen.
Fíggjarnevndin skipar seg sjálv.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt, at velja omanfyri nevndu limir og tiltakslimir í fíggjarnevndina valskeiðið 2021-2024 (9-0) Sostatt verður fíggjarnevndin mannað við Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni og Ólavur Larsen sum føstum limum og Eivin Breiðaskarð, Edvu Jacobsen og Gudny Vang sum tiltakslimum valskeiðið 2021-2024.

- **Val av Teknisku nevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Eivin Breiðaskarð á lista F og David Andreasen á lista F sum fastar limir og Magna Jøkladal á lista B sum tiltakslim fyri Eivin Breiðaskarð og Edvu Jacobsen á lista B sum tiltakslim fyri David Andreasen.

Listi Á mælir til at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Ólav Larsen sum tiltakslim.

Tekniska nevnd skipar seg sjálv.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt, at velja omanfyri nevndu limir og tiltakslimir í teknisku nevnd valskeiðið 2021-2024 (9-0) Sostatt verður tekniska nevnd mannað við Eivin Breiðaskarð, David Andreasen og Sonna á Horni sum føstum limum og Magna Jøkladal, Edvu Jacobsen og Ólavi Larsen sum tiltakslimum.

- **Val av Vinnu- og havnanevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Magna Jøkladal á lista B og David Andreasen á lista F sum fastar limir og Edvu Jacobsen á lista B og Eivin Breiðaskarð á lista F sum tiltakslimir fyri ávíkavist Magna Jøkladal og David Andreasen.

Listi Á mælir til at velja Gudny Vang sum fastan lim og Sonni á Horni sum tiltakslim

Vinnu- og havnanevndin skipar seg sjálv.

**Avgerð**
Samtykt var einmælt, at velja omanfyri nevndu limir og tiltakslimir í Vinnu- og havnanevndina valskeiðið 2021-2024 (9-0). Sostatt verður Vinnu- og havnanevndin mannað við Magna Jøkladal, David Andreasen og Gudny Vang sum føstum limum, og Edvu Jacobsen, Eivin Breiðaskarð og Sonna á Horni sum tiltakslimum.

- **Val av Mentamálanevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Eyðun á Lakjuni á lista B og Edvu Jacobsen á lista B sum fastar limir og Eivin Breiðaskarð á lista F og David Andreasen á lista F sum tiltakslimir fyri ávíkavist Eyðun á Lakjuni og Edvu Jacobsen.

Listi Á mælir til at velja Gudny Vang sum fastan lim og Sonna á Horni sum tiltakslim

Mentamálanevndin skipar seg sjálv

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt, at velja omanfyri nevndu limir og tiltakslimir í mentamálanevndina (9-0) Sostatt verður Mentamálanevndin mannað við Eyðun á Lakjuni, Edvu Jacobsen og Gudny Vang sum føstum limum og Eivin Breiðaskarð,

David Andreasen og Sonna á Horni sum tiltakslimum fyri ávíkavist Eyðun á Lakjuni, Edvu Jacobsen og Gudny Vang.

- **Val av Sosialu nevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Edvu Jacobsen á lista B og Eivin Breiðaskarð á lista F sum fastar limir og ávíkavist Eyðun á Lakjuni á lista B og David Andreasen á lista F sum tiltakslimir fyri Edvu Jacobsen og Eivin Breiðaskarð.

Listi Á mælir til at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Ólavur Larsen sum tiltakslim

Sosiala nevnd skipar seg sjálv.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at velja omanfyri nevndu limir og tiltakslimir í sosialu nevnd. Sostatt verður sosiala nevnd mannað við Edvu Jacobsen, Eivin Breiðaskarð og Sonna á Horni sum føstum limum og Eyðun á Lakjuni, David Andreasen og Ólavur Larsen sum tiltakslimum.

- **Val av Orku- og umhvørvisnevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja David Andreasen á lista F og Magna Jøkladal á lista B sum fastar limir og ávíkavist Eivin Breiðaskarð á lista F og Eyðun á Lakjuni á lista B sum tiltakslimir fyri David Andreasen og Magna Jøkladal.

Listi Á mælir til, at velja Ólav Larsen sum fastan lim og Gudny Vang sum tiltakslim.

Orku- og umhvørvisnevndin skipar seg sjálv.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at velja omanfyri nevndu limir og tiltakslimir í Orku- og umhvørvisnevndina, sum sostatt verður mannað við David Andreasen, Magna Jøkladal og Ólavur Larsen sum føstum limum og Eivin Breiðaskarð, Eyðun á Lakjuni og Gudny Vang sum tiltakslimum valskeiðið 2021-2024.

<u>Til nr. 3 – val av øðrum nevndum og umboðum</u>

- **Val av tilbúgvingarnevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Dávur Juul sum fastan lim og sum samstundis er formaður í tilbúgvingarnevndini, tá hann er borgarstjóri, og Magna Jøkladal á lista B sum fastan lim.

Listi Á mælir til at velja Sonna á Horni.

Harumframt er tilbúgvingarleiðarin og umboð fyri politiið í tilbúgvingarnevndini.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt, at velja omanfyri nevndu í tilbúgvingarnevndina (9-0). Tilbúgvingarnevndin er sostatt mannað við Dávur Juul, Magna Jøkladal, Sonna á Horni, umframt tilbúgvingarleiðaranum og umboði frá politinum valskeiðið 2021-2024.

- **Val av Felags Barnaverndarnevnd**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja tey umboð aftur, sum sita í barnaverndarnevndini í dag; tað eru: Sigga Óladóttir á Grønatúgvu og Diana Hansen sum fastar limir og Rósa Gaardlykke Egholm og Maria á Boðanesi sum tiltakslimir fyri ávíkavist Siggu Óladóttir á Grønatúgvu og Dianu Hansen.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt, at velja omanfyri nevndu fólk aftur í felags barnaverndarnevndina valskeiðið 2021-2024 (9-0).

- **Val av samstarvsnevnd um barnaverndartænastu millum Fuglafjarðar kommunu og Eysturkommunu**

Uppskot frá valbólkinum F og B um at velja Dávur Juul á lista F og Edvu Jacobsen á lista B sum fastar limir í samstarvsnevndina um barnavernd, og Eivin Breiðaskarð á lista F og Eyðun á Lakjuni á lista B sum tiltakslimir fyri ávíkavist Dávur Juul og Edvu Jacobsen.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at velja omanfyri nevndu í samstarvsnevndina um barnaverndartænastu millum Fuglafjarðar kommunu og Eysturkommunu

- **Val av samstarvsnevndina fyri eldraøkið Nánd**

2 uppskot vóru til hesa nevnd: Valbólkurin F og B høvdu í uppskoti at velja Dávur Juul á lista F og Edvu Jacobsen á lista B sum fastar limir og Eivin Breiðaskarð á lista F og Eyðun á Lakjuni á lsta B sum tiltakslimir fyri ávíkavist Dávur Juul og Edvu Jacobsen. Valbólkur Á hevði í uppskoti, at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Gudny Vang sum tiltakslim.

**Avgerð**

Atkvøtt varð fyrst um uppskotið frá valbólki Á: 3 atkvøður fyri: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen. 6 atkvøddu ímóti. David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni og Magni Jøkladal. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Atkvøtt varð síðani um uppskoti frá valbólkinum F og B: 7 atkvøður fyri: David Andreaen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu fyri. Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólkinum B og F varð sostatt samtykt.

- **Val av stýrinum fyri Framvit, sum fatar um Fuglafjarðar kommunu og Eysturkommunu**

2 uppskot til stýri fyri Framvit. Valbólkurin B og F hevði í uppskoti at velja Dávur Juul á lista F og Eyðun á Lakjuni á lista B sum fastar limir og David Andreasen á lista F og Magna Jøkladal á lista B sum tiltakslimir fyri ávíkavist Dávur Juul og Eyðun á Lakjuni.

Valbólkur Á mælir til at velja Gudny Vang sum fastan lim og Ólavur Larsen sum tiltakslim.

**Avgerð**

Atkvøtt var fyrst um uppskoti frá valbólki Á: 3 atkvøður vóru fyri: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen. 6 atkvøður vóru ímóti: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Atkvøtt var síðani um uppskoti frá valbólkinum B og F. 7 atkvøður vóru fyri: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen og Sonni á Horni. 2 atkvøður ímóti. Gudny Vang og Ólavur Larsen.

Uppskotið frá valbólkinum B og F um val av limum og tiltakslimum í stýrið fyri Framvit varð sostatt samstykt.

- **Val til Ráðið fyri Ferðslutrygd**

2 uppskot til Ráðið fyri Ferðslutrygd. Valbólkurin B og F hevði í uppskoti at velja Eivin Breiðaskarð á lista F sum fastan lim og David Andreasen á lista F sum tiltakslim.

Valbólkur Á hevði í uppskoti at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Gudny Vang sum tiltakslim.

**Avgerð**

Atkvøtt varð fyrst um uppskoti frá valbólki Á. 3 atkvøður fyri: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri. 6 atkvøddu ímóti: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen. Uppskotið frá lista Á fall tískil.

Atkvøtt varð síðani um uppskotið frá lista B og F: 6 atkvøður fyri: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri uppskotinum. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólki B og F varð sostatt samtykt.

- **Val av umboðum fyri ferðavinnuna í Eysturoynni**

2 uppskot vóru til hesa nevnd. Valbólkurin B og F mælti til at velja Magna Jøkladal á lista B sum fastan lim og Eyðun á Lakjuni á lista B sum tiltakslim.

Valbólkur Á mælti til at velja Gudny Vang sum fastan lim og Sonna á Horni sum tiltakslim.

**Avgerð**
Atkvøtt varð fyrst um uppskoti frá valbólki Á. 3 atkvøður fyri: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri. 6 atkvøddu ímóti: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Atkvøtt varð síðani um uppskotið frá valbólki B og F: 6 atkvøður vóru fyri uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni,

Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri uppskotinum. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólkinum B og F varð sostatt samtykt.

- **Val til Hellunevndina**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja somu umboð sum eru í dag í Hellunevndina. Borgarstjórin er fastur limur umframt Elibert Kerá og Jórun Eið Johannesen.

**Avgerð**
Uppskotið frá valbólkinum B og F var einmælt samtykt (9-0).

- **Val av umboði í IRF**

2 uppskot: Frá valbólkinum B og F varð mælt til at velja David Andreasen á lista F sum fastan lim og Dávur Juul á lista F sum tiltakslim. Valbólkur Á mælti til at velja Gudny Vang sum fastan lim og Ólavur Larsen sum tiltakslim.

**Avgerð**
Atkvøtt varð fyrst um uppskotið frá valbólkinum Á. 3 atkvøður fyri: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri uppskotinum. 6 atkvøddu ímóti: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Síðani varð atkvøtt um uppskoti fra valbólkinum B og F: 6 atkvøður vóru fyri uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri uppskotinum. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólkinum B og F varð sostatt samtykt.

- **Val av umboði í SEV**

2 uppskot: Frá valbólkinum B og F varð mælt til at velja Dávur Juul á lista F sum fastan lim og David Andreasen á lista F sum tiltakslim. Valbólkur Á hevði í uppskoti, at velja Ólavur Larsen sum fastan lim og Gudny Vang sum tiltakslim.

**Avgerð**
Atkvøtt varð fyrst um uppskoti frá valbólkinum Á: 3 atkvøður vóru fyri uppskotinum: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen. 6 atkvøður vóru ímóti uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen vóru ímóti uppskotinum. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá valbólkinum B og F: 6 atkvøður vóru fyri uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri uppskotinum. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólkinum B og F var sostatt samtykt.

- **Val av Gøtunavnanevnd**

Valbólkur B og F mælti til, at velja Magna Jøkladal á lista B, Asbjørn Berthelsen, Petur Martin Petersen og Sigurð Simonsen í Gøtunavnanevndina.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við tilmælinum frá valbólkinum B og F um at velja nevndu fólk í Gøtunavnanevndina.

- **Val til skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla**

2 uppskot: Frá valbólkinum B og F um at velja Edvu Jacobsen á lista B sum fastan lim og David Andreasen á lista F sum tiltakslim. Valbólkur Á mælti til at velja Gudny Vang sum fastan lim og Sonna á Horni sum tiltakslim.

**Avgerð**
Atkvøtt varð fyrst um uppskotið frá valbólki Á: 3 atkvøður vóru fyri uppskotinum: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen. 6 atkvøður vóru ímóti uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen vóru ímóti uppskotinum. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Síðani varð atkvøtt um uppskoti frá valbólkinum B og F: 6 atkvøður vóru fyri uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri uppskotinum. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólkinum B og F var sostatt samtykt.

- **Val av bygginevnd í sambandi við nýggja barnaskúlan**

Uppskot frá valbólki B og F um at velja Dávur Juul á lista F og Eyðun á Lakjuni á lista B í bygginevndina. Valbólkur Á hevði í uppskoti at velja Sonna á Horni.
**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at velja Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni og Sonna á Horni í bygginevndina fyri nýggja barnaskúlan. Harumframt eru fakfólkini Rønn Eliasen, mentanarleiðari, Ólavur Thomsen, skúlastjóri, Leivur á Lakjuni, skúlastýrisformaður, og Pætur Joensen, ráðgevandi verkfrøðingur, limir í hesi bygginevnd, sum verður tikin av, tá skúlin er liðugur í 2021.

- **Val av arbeiðs/hugskotsbólki í sambandi við eldrabygging**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja Edvu Jacobsen á lista B, Eivin Breiðaskarð á lista F og Sonna á Horni á lista Á í bólkin saman við fakfólkunum Poulu Reinert Petersen, Mariannu Hansen, Elsebeth Viðoy Simonsen, Irenu Olsen og Ann Fuglø.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum frá valbólkinum B, F og listanum Á um at velja nevndu fólk í arbeiðs/hugskotsbólkin í sambandi við eldrabygging.

- **Val av arbeiðsbólki í sambandi við nýggja heilsumiðstøð í gamla FK bygninginum**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja Dávur Juul á lista F, Edvu Jacobsen á lista B og Eivin Breiðaskarð á lista F í arbeiðsbólkin. Listi Á hevði í uppskoti at velja

Gudny Vang í arbeiðsbólkin. Harumframt hevði valbólkur B og F og listi Á í uppskoti, at velja Irenu Olsen, sosialdeildarleiðara, Ann Fuglø, byggifrøðing og Kristu Jørmundsson í arbeiðsbólkin.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at velja omanfyri nevndu fólk í arbeiðsbólkin í sambandi við nýggju heilsumiðstøðina í gamla FK bygninginum.

- **Val av Valstýrið til løgtingsval fyri Fuglafjarðar valdømi, sum fatar um Fuglafjørð og Kambsdal**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja tey somu fólkini, sum sita í valstýrinum í dag, aftur í valstýrið. Hesi fólk eru, fastir limir: Kristian Petersen, formaður, Borghild Hansen, Høgni Kristianson Hansen, Bjørghild Arnholdsdóttir og Steintóra H. Nesá. Tiltakslimir: Dan Reinet Petersen, Edmund Abrahamsen, Magni Joensen, Helle Poulsen og Jonn Thomsen.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum hjá valbólki B og F um at velja omanfyri nevndu fólk aftur í valstýrið til løgtingsval fyri Fuglafjarðar valdømi.

- **Val av valstýrið til fólkatingsval fyri Fuglafjarðar valdømi, sum fatar um Fuglafjørð og Kambsdal**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja tey somu fólkini, sum sita í valstýrinum í dag, aftur í valstýrið. Hesi fólk eru, fastir limir: Kristian Petersen, formaður, Borghild Hansen, Høgni Kristianson Hansen, Bjørghild Arnholdsdóttir og Steintóra H. Nesá. Tiltakslimir: Dan Reinert Petersen, Edmund Abrahamsen, Magni Joensen, Helle Poulsen og Jonn Thomsen.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum hjá valbólki B og F um at velja omanfyri nevndu fólk aftur í valstýrið til fólkatingsval fyri Fuglafjarðar valdømi.

- **Val av kommunalvalstýrið fyri Fuglafjarðar valdømi**

Eyðun á Lakjuni gjørdi vart við, at hann er bróðir formannin í kommunuvalstýrinum, Terja á Lakjuni. Nývalda býráð og kommunustjóri mettu ikki Eyðun á Lakjuni at verða ógegniðan í hesum sambandi.

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja somu fólk aftur í kommunuvalstýrið. Hesi fólk eru: Fastir limir: Terji á Lakjuni, formaður, Jónfríð Jacobsen, Elin Gaard Sleire, Poul Jákup Mohr og Helle Poulsen. Tiltakslimir: Marjun R. Petersen, Bogi Lervig, Heidi Nón, Eyðfríð Vík og Marin S. Thomsen.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum hjá valbólki B og F um at velja omanfyri nevndu fólk aftur í kommunuvalstýrið fyri Fuglafjarðar valdømi.

- **Val av umboðum í Hallarnevndina á Kambsdali**

2 uppskot til umboð. Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja Dávur Juul á lista F og Magna Jøkladal á lista B sum fastar limir og David Andreasen og Eyðun á Lakjuni sum tiltakslimir fyri ávíkavist Dávur Juul og Magna Jøkladal.

Uppskot frá valbólkinum Á um at velja Ólavur Larsen á lista Á og Dávur Juul á lista F sum fastar limir og Gudny Vang og Sonna á Horni sum tiltakslimir fyri ávíkavist Ólavur Larsen og Dávur Juul.

**Avgerð**
Atkvøtt varð fyrst um uppskotið frá lista Á: 3 atkvøður vóru fyri uppskotinum: Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen. 6 atkvøður vóru ímóti uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen vóru ímóti uppskotinum. Uppskotið frá valbólki Á fall tískil.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá valbólkinum B og F. 6 atkvøður vóru fyri uppskotinum: David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri uppskotinum. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu ímóti.

Uppskotið frá valbólkinum B og F var sostatt samtykt.

- **Val av Hegnsýnisnevndini**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja somu fólk aftur í hegnsýnisnevndina. Hesi fólk eru sum fastir limir: Samson Mikkelsen, Bjarni Joensen og Mortan Berjastein. Tiltakslimir: Asbjørn Berthelsen og Finnur Gudmundson.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum frá valbólkinum B og F um at velja omanfyri nevndu fólk aftur í hegnsýnisnevndina.

- **Val av umboði í Kommunufelagið**

Borgarstjórin er fastur limur í Kommunufelagnum sambært viðtøkum felagsins.

- **Val av Skattakærunevndini fyri Eysturoy**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja som fólk aftur í skattakærunevndina. Hesi fólk eru: Kristian Martin Petersen og Annika Rasmussen.

**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum frá valbólkinum B og F um at velja omanfyri nevndu fólk aftur í skattakærunevndina fyri Eysturoy.

- **Val av valnevnd til skúlastýrisval fyri Fuglafjarðar skúla**

Uppskot frá valbólkinum B og F um at velja somu fólk aftur í valnevndina. Hesi fólk eru ávíkavist Ólavur Thomsen, skúlastjóri, sum eisini er formaður í valnevndini, og Maria á Boðanesi
**Avgerð**
Samtykt varð einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum frá valbólkinum B og F um at velja omanfyri nevndu fólk aftur í valnevndina til skúlastýrisval fyri Fuglafjarðar skúla.

Nývalda býráðið gjørdi av, at velja onkra aðra nevnd og stýri á einum seinni fundi; eitt nú valstýrini til ávíkavist fólkatings-, løgtings- og kommunuval fyri Hellurnar valdømi.

Fundurin lokin kl. 21:20

Gerðabókin lisin og góðkend

Dávur Juul

David Andreasen

Eivin Breiðaskarð

Eyðun á Lakjuni

Magni Jøkladal

Edva Jacobsen

Ólavur Larsen

Gudny Vang

Sonni á Horni